Landssjúkrahúsið

Skurðviðgerð fyri brokk í lærkrikanum

Um brokk í lærkrikanum

Búkveggurin í lærkrikanum hevur fleiri veik støð, har búkhindan kann bugla fram gjøgnum búkveggin. Hetta kallast eitt brokk.

Eitt brokk er sett saman av einum brokksekki av búkhinnuni og hesin kann eisini rúma eitt sindur av tarminum. Ofta glíður brokkið aftur og fram, tað vísur seg serliga, tá tú stendur og pressar, men fer so burtur, tá tú leggur teg niður.

Brokkið kann vísa seg í lærkrikanum ella ovast á lærinum. Hjá monnum kann tað eisini vísa seg í punginum og hjá kvinnum í kynsvarrunum.

Orsøkir og sjúkueyðkenni

Brokk í lærkrikanum kann koma knappliga, um tú spennir hart á (m.a. lyftir tungt), men mest vanligt er, at brokkið kemur so líðandi. Sum oftast gevur brokkið ongan ampa, men kann geva pínu, serliga tá tú ger tungt kroppsligt arbeiði ella tá tú hostar.

Viðgerð av brokk í lærkrika

Vanliga ber til at trýsta tey smærru brokkini uppá pláss, men við tíðini vaksa tey flestu brokkini og kunnu tá ikki altíð trýstast uppá pláss aftur.

Vandin við einum brokki er, at ein lítil partur av tarminum kann blíva kleimdur í tí trongu brokkrásini og kann hetta hava við sær at tú fær eitt inniklemmað brokk við tarmakast (ileus). Hjá eldri, ið hava brokk í lærkrikanum uttan sjúkueyðkenni, ber til at bíða við skurðviðgerð til ampi stendst av hesum.

Forkanning

Áðrenn skurðviðgerðina kemur tú til eina kanning hjá serlækna í maga og tarm skurðfrøði. Hesin kannar teg og tit tosa saman um hvussu hetta ávirkar teg. Tað kann í summum førum verða neyðugt at gera aðrar kanningar fyri at útiloka aðrar sjúkur.

Aftaná greiður serlæknin frá hvørjir viðgerðarmøguleikar eru og saman finna tit bestu loysninga fyri teg. Serlæknin kunnar teg um skurðviðgerðina, tíðina aftaná, møgulig hjáárin og tvørleikar.

Væntanir

Skurðviðgerðin er munadygg og hjá færri enn 5% verður brokkið endurskapað. Tað eru fáar fylgjur og tvørleikar aftaná.

Vætufylling

Fyrstu vikuna aftaná kikaraskurðviðgerð kann koma ein vætusamlan í holrúmi, har brokkið sat. Vætufyllingin fer burtur av sær sjálvum, men um hon ger fortreð, ber til at tøma hana við einari nál.

Fyrireiking

Áðrenn skurðviðgerðina kallað vit inn til journalupptøku, har tú fært kunning um fastu, møguliga pausu við blóðtynnandi heilivági og reinføri áðrenn skurðviðgerð.

Eisini fært tú útflýggjað ein faldara um doyving, ið vit viðmæla, tú lesur áðrenn skurðviðgerðina. Er talan um barn, ið skal skurðviðgerðast, viðmæla vit, at tit sum foreldur lesa faldaran um børn og doyving.

Hesir faldarar finnast eisini á www.ls.fo . Eisini ber til at finna tilfar, ið kann vera við at fyrreikað barnið betur til komandi viðgerðir á www.hcand.dk .

Skurðviðgerðin

Skurðviðgerðin verður gjørd sum dagskurðviðgerð og tú kann vænta at sleppa heim sama dag. Opna skurviðgerðin tekur umleið ein tíma, meðan kikaraskurðviðgerðin tekur umleið hálvanannan tíma.

Børn

Hjá børnum verður skurðviðgerðin altíð gjørd gjøgnum ein lítlan skurð í lyskuni og net verður ikki brúkt.

Vaksin – opin skurðviðgerð

Tað verður gjørdur ein lítil skurður í lærkrikanum uppi yvir brokkinum og tað, ið er inni í brokkinum, verður skumpað innaftur í búkholuna. Síðani verður brokkopið í búkvegginum latið aftur og eitt tilgjørt net verður seymað inn fyri at styrkja um búkveggin, har hann er veikastur.

Vaksin – kikaraskurðviðgerð

Gjøgnum eina tunna nál verður luft blást inn í búkholuna, hetta ger at búkveggurin lyftir seg og tað verður pláss í búkholuni at skera. Skurðviðgerðin verður gjørd gjøgnum trý smá hol í búkvegginum. Á hendan hátt verður brokkið skurðviðgjørt innaníframá. Undir skurðviðgerðini verður vevnaðurin kring brokkumráðið fríttlagdur og síðan styrktur við einum tilgjørdum neti.

Lokaldoyving verður løgd í sárið, tá skurðviðgerðin er liðug. Sum oftast verður húðin seymað saman við sjálvupploysiligum tráði, klipsum ella nylontráði, ið skal takast burtur aftur.

Aftaná skurðviðgerðina

Aftaná skurðviðgerðina tosar tú við serlæknan og sjúkrarøktarfrøðingin, sum eru um teg, og tey kunna teg um víðari ætlan og hvussu tú annars skal fyrihalda teg aftaná skurðviðgerðina.

Tá tú er útskrivaður

Pína

Tú kanst vænta, at hava lætta til miðal pínu aftaná skurðviðgerðina. Til ber at taka vanligan hondkeypsheilivág sum pínustillandi. Aftaná kikaraskurðviðgerðina kanst tú vænta at hava pínu í høgru øksl fyrstu 1-2 samdøgnini. Hetta kemst av, at luft er blást inn í búkholuna.

Sár/plástur

Tú kanst taka plástur/umvæv burtur dagin eftir skurðviðgerðina (aftaná 24 tímar) og tað er bert neyðugt at leggja nýtt plástur, um tað vætar frá skurðinum.

Bað

Tú kanst fara í brús dagin eftir (24 tímar aftaná). Best er at bíða við svimjing og karbað til dagin eftir at penturnar eru tiknar.

Troti og mislitan

Økið um skurðin verður ofta hovið og mislitt fyrstu vikuna. Hetta fer burtur av sær sjálvum-

Eta og drekka

Tú kanst eta og drekka vanligan mat. Ikki er neyðugt at taka nakað fyri at halda magan í gongd, men hevur tú trekan maga so drekk ríkiligt av vatni ella keyp heilivág í hondkeyp á apoteinum fyri hetta.

Rørsla aftaná skurðviðgerð

Tú kanst røra teg sum vanligt aftaná skurðviðgerðina

Avmarkingar

Ikki er vanligt við nøkrum avmarkingum aftaná tú ert skorin fyri brokk í lærkrikanum. Serlæknin gevur tær boð, um okkurt skuldi verið, sum ger, at tú ikki mást lyfta tungt fyrstu tíðina

Sjúkrameldan

Vanliga er bert neyðugt at verða sjúkrameldaður 1-2 dagar aftaná skurðviðgerðina. Møguliga 1-2 vikur um tú hevur tungt arbeiði.

Burturtøka av klips ella pentum og uppfylgjan

Penturnar ella klipsini skulu takast burtur 10-14 dagar aftaná skurðviðgerðina. Er talan um klips, fær tú eina tong heim við til endamálið. Er tú seymað(ur) við sjálvupploysiligum træðrum, fara hesir burtur av sær sjálvum. Ikki er neyðugt við nakrari uppfylgjan.

Møgulig hjáárin og fylgir

Blóðsamlan

Hjá nøkrum fáum sjúklingum kann koma ein blóðsamlan. Henda vísur seg við at umráði runt um skurðin og møguliga niður mótið undirlívinum og kynsgøgnunum verður blálilla og hovi. Sum oftast fer hetta burtur av sær sjálvum.

Bruni í sárinum

Verður økið kring skurðin meira og meira hovið, eymt og reytt og tú fært fepur, so skal tú venda tær til kommunulæknan. Hetta kann vera tekin uppá bruna í skurðinum.

Svullur í sárinum

Hjá færri enn 1 % kann koma ein svullur í sárið og hesin kann gera, at neyðugt er at opna sárið aftur og reinsa tað.

Sárið skal tá haldast opið og reinsast dagliga, møguligani kann tað seymast aftur við lokaldoyving aftaná 4-5 dagar.

Endurskapan av brokki

Hjá færri enn 5% kann brokkið koma aftur. Til ber at skurðviðgera aftur í hesum førum.

Pína í skurðøkinum

Hjá 10-15%, serliga teimum, ið hava fingið opna skurðviðgerð, kann uppá longri sigt koma óbehag og møgulig pína í skurðø-kið og tað kann tí gerast neyðugt at taka pinustillandi fyri hetta.

Vinarliga

Starvsfólkini á Skurðdeplinum